## Popczynski skal venja Aarhus Fremad

Eftir at hava vant fýra føroysk feløg seinastu árini, skal póllendingurin Krzysztof Popczynski nú venja danska felagið Aarhus Fremad. - Eg havi valt at flyta til Danmarkar, tí unnusta mín er donsk, og tí eg havi vunnið alt í Føroyum og tí gjarna vil víðari, sigur Krzysztof Popczynski við Århus Stifstidende. Danska 2. deildarfelagið hevur gjørt ein trý ára sáttmála við Krzysztof Popczynski, og tað fegnast tey um. - Vit eru sera fegin um at fáa Krzysztof til felagið. Hann hevur víst stóran áhuga fyri starvinum, og hann hevur eina spennandi fótbóltsfilosofi, sum vit gleða okkum til at fáa innført her í felagnum, sigur Aarhus Fremad í tíðindaskrivi. Krzysztof Popczynski hevur áður spælt í donskum fótbólti – tað var fyri Esbjerg. Síðani hevur hann vant VB, GÍ, HB og TB í føroyskum fótbólti. Í farnu viku kom fram, at Krzysztof Popczynski ikki skuldi halda fram á Tvøroyri, men longu nú hevur hann fingið nýtt starv.

## Svimja til Nólsoyar 16. august

Í ár verða tveir teinar at svimja. Tann vanligi, har byrjað verður niðanfyri hjá radioamatørunum. Teinurin er 4.000 metrar til Nólsoyarbygd. Hin teinurin er 1.000 metrar, har byrjað verður frá báti, ið liggur úti fyri bygdini. Øll møtast hjá radioamatørunum klokkan 15. Klokkan 16 leypa tey, ið svimja 4.000 m, á bláman yviri við Strond við Stóradam, niðanfyri hjá radioamatørunum. Tey, ið svimja 1.000, fara samstundis í bátarnar og sigla til startmálið 1.000m úr Nólsoyar bygd, har tey byrja svimjingina klokkan 17. Málið hjá báðum bólkum er Heiðursportrið niðri á keiini í Nolsoy.

# Drekin er meistari

**Genturnar hjá Havnar Róðrarfelag tryggjaðu vertsfelagnum fyrsta FM heitið í ár. – Vit hava veruliga viljað hetta, segði Elin Sofía á Tjaldrafløtti**

KAPPRÓÐUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Drekin vann FM í kappinginimillum 5-mannaførini við gentum.

Firvaldur, Jallurin og Hvassi royndu at fylgja við. Eftir góðan start bar tað illa til hjá Hvassa, sum var einasta FM hóttanum ímóti Drekanum.

Firvaldur bjóðaði av framvið Molanum, og eina løtu vóru tær av Tvøroyri fremstar. Men so stakk Drekin seg framum, og í endaspurtinum vóru tað tær umborð á Hvassa, sum vóru drúgvastar - aftanfyri Drekan.

Drekin var sannførandi og eina stóra bátslongd fremstur á mál.

– Hetta er fantastiskt, segði ovurfegna Elin Sofía á Tjaldrafløtti beint eftir, at róðurin var av.

– Vit vóru fýra bátur, sum skiftust allan vegin inn eftir, so tað var ótrúligt, at vit vóru sterkast. Og tað ger tað bara betri, at hetta er fyrsta ferðin, at Havnar Róðrarfelag hevur eina gentumanning, sum vinnur bæði FM og ólavsøkuróðurin, helt Elin Sofía á Tjaldrafløtti, sum saman við hinum gentum umborð á Drekanum, var við at bøta um metið upp á næstan ein hálvan minutt. – Vit hava tapt tepurt áður, men hava dugað at rættað uppá mistøkini so hvørt. Og so hava vit veruliga viljað hetta, segði altso ovurfegna Elin Sofía á Tjaldrafløtti.



*– Hetta er fantastiskt, sigur Elin Sofía á Tjaldrafløtti*

**Ólavsøkutíðin:**
1 Drekin 04:29.24
2 Hvassi 04:31.16
3 Jallurin 04:32.06
4 Junkarin 04:36.07
5 Firvaldur 04:36.13
6 Tambar 04:45.24
7 Blikur 04:47.03

**Støðan:**
1 Drekin (FM) 47
2 Hvassi 44
3 Jallurin 31
4 Junkarin 31
5 Firvaldur 22
6 Tambar 11
7 Blikur 10
8 Teistin 0

# Jarnbardur vísti vestmannagentum burtur

**Fortuna legði ógvuliga bragdliga fyri, men tá ið málið var hálvrógvið, vann Jarnbardur fremsta plássið. – Ein ótrúliga harður róður, staðfesti Hildibjarta Simonsen umborð á Jarnbardi**

KAPPRÓÐUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*– Hetta var ikki lætt. Tær tóku inn á okkum og vit inn á tær, so vit skiftust um fremsta plássið alla tíðina, segði Hildibjarta Simonsen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Jarnbardur staðfesti við sigrinum mánadagin so ruddiliga FM heitið í kappingini millum 6-mannafør við kvinnum.

Jarnbardur legði seg á odda, tá ið málið var hálvrógvið. Á Mola høvdinum fór Jarnbardur framum Fortuna, og síðani var eingin ivi um, at meistararnir í Knørrafelagnum fóru at vinna.

Men tær umborð á Fortunu vóru treiskar. Vestmannakvinnur løgdu bragdliga fyri, og tá ið Jarnbardur ikki fekk so góðan start, so kendist tað at vera rættiliga spennandi.

Fortuna var fremst inn á Molahøvdið. Eina løtu vóru tær ein stóran skut frammanfyri tær næstu, men so vístu meistararnir, hvat býr í teimum.

Eina løtu tóktist tað sum um, at munurin var tað mesta av einari bátslongd, men á málinum var fjarstøðan frá suverena Jarnbardi og aftur til Fortunu ein stórur skutur. Spurturin hjá vestmannakvinnum var ógvuliga dyggur, men hann rakk altso ikki til meiri enn somu plasering, sum hon var í Miðvági fyri stórum tveimum vikum síðani.

– Hetta var ikki lætt. Tær tóku inn á okkum og vit inn á tær, so vit skiftust um fremsta plássið alla tíðina, og tað er ógvuliga hart, tá man ongantíð kann kenna seg tryggan, segði Hildibjarta Simonsen, sum við gullkrónum um hálsin kortini kundi føla seg trygga sum FM-vinnari.

| **Ólavsøkutíðin:** | **Støðan:** |
|---|---|
| 1 Jarnbardur 04:53.24 | 1 Jarnbardur (FM) 48 |
| 2 Fortuna 04:54.24 | 2 Gongurólvur 40 |
| 3 Gongurólvur 05:05.17 | 3 Lómur 22 |
| 4 Lómur 05:08.03 | 4 Fortuna 18 |
| | 5 Hósvíkingur 5 |

# Sílið setti sannførandi punktum

**Framvið Molanum vístu kvinnurnar á Sílinum, hví tær so ruddiliga hava vunnið FM heitið**

KAPPRÓÐUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Umborð á Sílinum høvdu tær alla orsøk til at fegnast, tá tær við ólavsøkusigrinum kundu staðfesta, at tær komu ósigraðar gjøgnum róðrarárið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað gekk, sum tað hevur gjørt í hinum seks FM kappingunum. Kvinnurnar á Sílinum vunnu, og harvið eru tær meistarar við fullum stigatali.

Leingi var tað heilt spennandi. Saman við Sílinum hevði Frúgvin góðan start, og inn á Molan var rættuliga javnt ímillum teir báðar fremstu bátarnar.

Erla Kongsdóttir og Katla bjóðaðu eisini av, og tær vóru ógvuliga drúgvar. Men á málinum var einki at ivast í. Sílið vann við einari bátslongd aftur til Frúnna, og Erla Kongsdóttir og Katla vóru í tættari kapping um næstu plássini.

Sammett við fyrstu róðrarnar var hesin róðurin hugaligari hjá áskoðarunum á tann hátt, at tað var væl klárari hesa ferð.

| **Ólavsøkutíðin:** | **Støðan:** |
|---|---|
| 1 Sílið 04:48.03 | 1 Sílið (FM) 49 |
| 2 Frúgvin 04:50.14 | 2 Frúgvin 42 |
| 3 Erla Kongsdóttir 04:52.08 | 3 Erla Kongsdóttir 31 |
| 4 Katla 04:53.09 | 4 Katla 28 |
| 5 Báran 04:55.06 | 5 Báran 21 |
| 6 Ritan 04:59.07 | 6 Ritan 17 |
| 7 Teistin 05:02.04 | 7 Teistin 7 |
| 8 Blikur 05:03.20 | 8 Havfrúgvin 1 |
| | 9 Blikur 1 |
| | 10 Falkur 0 |
| | 11 Fípan Fagra 0 |